

## Pakkhúsið Krik sýnir fram í Smiðjuni

Fyri triðju ferð sýnir »Pakhuset Krik« úr Thy í Danmark fram úrval av føroyskari list í Smiðjuni í Lítluvík. - Áhugin fyri framsýningini hevur verið sera stór hini árini, og í ár hava vit eisini áhugaverdar myndir av Sámal Joensen-Mikines, Jóannis Kristiansen, Tummas Arge o. a., sigur »Pakhusen Krik« í tíðindaskrivi. Umframt eitt savn av grindakvívum, hava tey eisini originalar litografiir frá víðgitnu ferðini, sum »Yachten Maria« gjørdi til Føroya í 1854 og sum eru vorðnir kendir á føroyskari frímerkjarøð í 2004. Framsýningin í Smiðjuni í Lítluvík er týsdagin 21. apríl frá klokkan 15 til 21 og mikudagin 22. apríl frá kl 11 til 18.

# Tróndur í Gøtu gongur aftur

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð fara føroyingar í næstum at fáa møguleikan at síggja veruligar voksdukkur í Føroyum. Tey avmyndaðu eru fólk úr Føroya Søgu**



*Ernst og Agusta Backmann saman við einum høvuðleysum Sigmundi Brestirssyni*

SØGA OG VINNA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Eins og vit fyrr hava greitt frá her í blaðnum, so arbeiða tey í Vestmanna Tourist Centre við eini sera spennandi verkætlan sum er eitt søgusavn við sera meinlíkum persónsfigurum úr søguni. Eitt nú Tróndur í Gøtu, Sigmundur Brestirsson, Annika í Dímun og Húsfrúgvin í Húsavík fara at taka ímóti gestunum á savninum, sum letur upp fyrst í mai mánað.

Søgusavnið verður á 1. hædd í bygninginum hjá Vestmanna Tourist Centre, sum stendur við bátahylin í Vestmanna. Tað er eisini hagani, bátarnir hjá Sjóferðum, sum sigla útferðir undir Vestmannabjørgini, sigla.

### Sonn list

Tað eru íslendingarnir Ernst og Agusta Backmann sum hava tilevnað sjálvar persónfigurarnar. Fólk úr Føroyum hava verið í Íslandi, har tey hava staðið modell og nú hava íslendingarnir so verið í Føroyum og sett figurarnar upp. Og sigast má, eins og myndirnar eisini vísa, at talan er um sera gott handverk, har tað er alt annað enn lætt at síggja mun á figurunum og veruligum fólki.

Ernst og Agsta Backman reka eitt líknandi savn í Perluni í Reykjavík, eins og tey hava eitt verkstað, sum ger persónsfigurar.

- Hetta er størsta verkætlanin, vit hava arbeitt við, umframt okkara egna savn, sigur Ernst Backmann, sum stendur fyri gerðini av persónsfigurunum.

### Útbyggja

Bátatúrarnir undir Vestmannabjørgini hava í nógv ár drigið væl av fólki til Vestmanna. Og fyri nøkrum árum síðani bygdi smápartafelagið Skúvadal saman við øðrum Vestmanna Tourist Centre, har eisini matstovan Fjørukrógvin heldur til. Í erva í bygninginum er eitt høli sum er eina 200 fermetrar stórt, og tað er her, nýggja Søgusavnið fer at halda til.

– Vit hava alla tíðina roynt at gera tað meira spennandi og forkunnugt at koma til Vestmanna, og nýggja savnið er ein liður í hesum miðvísa arbeiðnum, sigur Gunnar Skúvadal, stjóri í feløgunum. Talan verður um eitt serstakliga spennandi og í allar mátar gjøgnumført savn, har allir sansir verða stimbraðir. Ljós, ljóð og enntá luktur er ein partur av hesum forkunnuga upplivilsinum.

Umframt íslendsku listarfólkini hava eisini kend, føroysk listarfólk verið við til at gera savnið. Edvard Fuglø hevur málað fleiri málningar, sum prýða veggirnar á savninum. Pól Skarðenni hevur gjørt sjálvar pallmyndirnar og Herleif Hammer, søgufrøðingur, hevur samskipað allar verkætlanina.



*Tróndur í Gøtu tá hann manar Sigmund Brestirsson fram frá deyðum*



*Ein hongdur seyðatjóvur er eisini at síggja á savninum*